skemt

# Fornminnissøvn?




## Lappa-loysn!





213704 ell
annbrittogthomas@hotmail.com

Ymiskt

GRANITSKERVUR TIL SØLU
0 sekkir av gráum og reyðum granitskervi til sølu fyri 75 kr. sekkurin.
Tlf. 318611 ella 518611

GRANITPLÁTUR TIL SØLU



Á LOPPUMARKNAÐINUM LEYGARDAGIN 9 JUNI
Er jakkin hjá einum hjálparfólki horvin (av misgávum seldur) Jakkin er myrkareyður, hálvsíður, plastik uttan, myrkareytt plyss í hettuni, oman við snarlásinum og um ermakanarnar. Lykil við telefonnummarskelti í lummanum. Veit nakar um hann, vinarliga ring
Reyði Krossur Føroya, tlf. 319630 ella 283630



ELEGANTUR SIBIRISKUR BRÚÐARKJÓLI
Bert eina ferð brúktur, til sølu ella leigu str. medium.
Vlada tlf.580559.
E-mail vladas@sol.dk

Sjavs



Burturm. /funnið

GRUNDSTYKKIÐ Í VÁGI TIL SØLU
Grundstykkið er 164 fermetrar, útgrivið og planerað. Verður selt um hóskandi boð fæst.
Tlf. 313968 ella 220853

# Í rangastrúpan

***Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði brævog telduposti.***

### Tað sigur seg sjálvt?

»Vegna umvælingar á Kommunalu Brennistøðini og Endurnýtsluni verður stongt, tá latið verður aftur týskvøldið.«

**Torshavn.fo**

### So mugu fleiri postboð til

»Hann ætlaði eisini at skera postútberingina niður til tríggjar ferðir um dagin«

**Dimmalætting**

### Nú so

»Opið hús á lukkaðari deild«

**Útvarpið**

## Leyst og fast um stórt og smátt

Sendikvinnan í Reykjavík er funnin, BALLE er búin. Vit fáa sendistovu og JÁKUPSSTOVU. Lat okkum taka tað sum eina MOHR-roynd!

Yrkingasavn hjá Jack Petersen kemur út í næstum. Væntandi verður onkur yrking, sum verður RHESUS-full!

Fyrr bleiv rópt á Jack á Sevmýri: „Koyr á".
Nú verður bara rópt: „Koyr í"!

Musikklærarnir, sum hava gittar sum undirvísingargrein krevja nú at fáa AKKORD-arbeiðið!

Tórshavnar býráð fekk ikki „Skeiva Pakkhús", men teir fingu skeivan bygningin til umsiting meina mong!

Sofus Clementsen sigur, at tað „er so nógv luft í systeminum",
at væntandi verður næsta frímerki eitt lokum-motiv!

Spariknívur ella brævaknívur!

Songwriter - er tað ein sum situr uppi í songini og skrivar?